## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:** Gul til stívt andøvsgul av vestri og útsynningi og eitt skifti regn, annars turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið hósdagin:** Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið veksur hann vindin upp í hvassan vind og regn og mjørki. Hitin um 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:** Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin um 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:** Leygardagin gul til stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur, sunnudagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av suðri og yvirhøvur turt. Hitin millum 9 og 13 stig.

# Skotið ígjøgnum oman fyri Norðskála

Seinasta skotið í Eiði 2 Norður verkætlanini hjá SEV varð latið av í gjáranáttina. Sostatt er nýggi vatnsavningartunnilin knýttur í tunnilin frá Eiðisvatni suður til Norðskála

**ORKA**
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Nú líður væl við vatnorkuútbyggingini hjá SEV omanfyri Norðskála. Í gjáranáttina varð síðsta skotið latið av í Eiði 2 Norðurverkætlanini hjá SEV, og er nýggi vatnsavningartunnilin, ið røkkur suður um Stórá, nú knýttur í tunnilin, ið gongur frá Eiðisvatni til Norðskála.

Hetta boðar SEV frá á heimasíðu sínari.

Tunlarnir møtast einar 200 metrar norðanfyri rundkoyringina á landsvegnum niðan til Norðskálatunnilin.

Við nýggja tunlinum, ið er 2,6 kilometrar langur, er samlaða longdin á vatntunnlinum níggju kilometrar, men tá Eiði 2 Suður er liðugt, verður tunnilin 17,4 kilometrar langur. Tað arbeiðið byrjar í vár, og snýr seg um at leinga tunnilin 8,4 kilometrar suður móti Selatrað.

Arbeiðið við Eiði 2 Norður verður væntanti liðugt um ein mánað ella so, og samlaði byggikostaðurin fyri Eiði 2 Norður er um 66 milliónir krónur.

### Nógv orka í tunnlunum

Eiði 2 verkætlanin er liður í strembanini hjá SEV at økja um framleiðslupartin av varandi orku.

Norðari partur av ætlanini gevur 4,5 milliónir kWh aftrat av vatnorku, og tá sunnari partur er liðugur í 2013, kunnu út við 12 milliónir kWh leggjast omaná aftrat av grønari orku.

Samanlagt fer hetta sostatt at økja vatnorkuframleiðsluna við 16 milliónum kWh ella umleið 17 prosentum.

Í 2008 stavaðu 40 prosent av elframleiðsluni frá varandi orkukeldum – 35 prosent frá vatnorkuverkunum og 5 prosent frá vindmyllum.



*Eiði 2 verkætlanin ber í sær, at Eiðisverkið verður bygt út við eini turbinu afturat*

*Mynd: SEV*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 2 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -- |
| Ammassalik | -- |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 14 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 16 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 25 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 26 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 34 |
| Sydney | 17 |
| New York | 25 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ







**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1001 hPa. eystan fyri Grønland fer eystureftir og kuldabrúgvin haðani til Føroya fer eisini eystureftir.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið eystan fyri Hvarvið stendur mestsum í stað og hitabrúgvin sunnan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/09 kl. 06[00] – 14/09 06[00]. Hitin í gjár: 10,9°
Minsti hiti máldur í september: -0,5° -
Mesti hiti máldur í september: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 13/09 kl. 06[00] – 14/09 06[00].
Avfallið higartil í september: 43 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

12. september Seinna kvarter
16. september Mánin næstur jørðini
18. september Tendring

Kelda. Álmanakkin 2008

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 15. sept | 04:14 | 16:40 | 03:14 | 15:40 | 03:29 | 15:55 | 06:14 | 18:40 | 07:14 | 19:40 | 02:29 | 14:55 | 01:29 | 13:55 | 04:29 | 16:55 | 05:29 | 17:55 | 03:59 | 16:25 | 05:14 | 17:40 |
| 16. sept | 05:04 | 17:29 | 04:04 | 16:29 | 04:19 | 16:44 | 07:04 | 19:29 | 08:04 | 20:29 | 03:19 | 15:44 | 02:19 | 14:44 | 05:19 | 17:44 | 06:19 | 18:44 | 04:49 | 17:14 | 06:04 | 18:29 |
| 17. sept | 05:53 | 18:18 | 04:53 | 17:18 | 05:08 | 17:33 | 07:53 | 20:18 | 08:53 | 21:18 | 04:08 | 16:33 | 03:08 | 15:33 | 06:08 | 18:33 | 07:08 | 19:33 | 05:38 | 18:03 | 06:53 | 19:18 |
| 18. sept | 06:41 | 19:05 | 05:41 | 18:05 | 05:56 | 18:20 | 08:41 | 21:05 | 09:41 | 22:05 | 04:56 | 17:20 | 03:56 | 16:20 | 06:56 | 19:20 | 07:56 | 20:20 | 06:26 | 18:50 | 07:41 | 20:05 |
| 19. sept | 07:28 | 19:52 | 06:28 | 18:52 | 06:43 | 19:07 | 09:28 | 21:52 | 10:28 | 22:52 | 05:43 | 18:07 | 04:43 | 17:07 | 07:43 | 20:07 | 08:43 | 21:07 | 07:13 | 19:37 | 08:28 | 20:52 |




